

*Ford Focus C-Max Van er ein kvikur og arbeiðsvinarligur vørubilur við stórum vørurúmi*

# Ford Focus C-Max sum Van

**Ford eru nú komnir á marknaðin við Ford Focus C-Max Van, sum er ein vørubilur við stórum vørurúmi. Talan er um ein kvikan og arbeiðsvinarligan bil**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Ford Focus C-Max, sum kom á marknaðin um árskiftið, fæst nú eisini sum ein rúmligur vørubilur.

Vørurúmið er 150 cm langt og 90 cm høgt. Breiddin millum hjólkassarnar er 105 cm, og bilurin lastar 650 kg. Hurðarnar eru stórar og vørurúmið arbeiðsvinarligt.

Fleiri motorar eru at velja ímillum: 1,6 TDCi við 110 hk, 1,8i við 120 ella 125 hk, og ein 2,0 TDCi við 136 hk. Bilurin fæst í útgávunum Ambiente og Trend.

Bilurin er lættur at koyra, bilførarin situr høgt við góðum útsýni og alt rundan um hann er ergonomiskt rætt, t.d. situr girstongin í instrumentborðinum - tætt við rattið.

Hóast Focus C-Max Van er hægri enn ein vanligur persónbilur, er hann eins stúttur og ein persónbilur at koyra. Undirvognurin er tann sami sum á nýggja Focus persónbilinum, sum kemur á marknaðin seinni í ár..

TAÐ ER NÚ, PENGAR KUNNU SPARAST!!!

FOCUS C-MAX Van 1.8 i (120 HK og 125 HK)



Ambiente prísur kr. 175.000,- uttan bil í býti
Trend prísur kr. 182.000,- uttan bil í býti

FOCUS C-MAX Van 1.6 Tdci (110 HK)

Trend prísur kr. 197.000,- uttan bil í býti

FUSION Van 1.4 Tdci




Trend prísur kr. 136.000,- uttan bil í býti

Ford P/f Wenzel Ford

Akranesgøta 5 · 100 Tórshavn · tel. 354500 · fax 354501 · www.wenzel.fo · wenzel@post.olivant.fo






*Hetta er nakað, eg havi hugsað um leingi, sigur Ludvík Petersen, sum her stendur framman fyri brúktbiladeplin, Bilfríðkan, á Hjalla. Komandi vikuskifti hevur listamaðurin Kári Svensson framsýning hjá Bilfríðkan, sum liggur yvir av Litaval á Hjalla*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Bilfríðkan við nýggjum brúktbiladepli á Hjalla

**Leygardagin 15. mai letur Bilfríðkan upp stóra brúktbilasølu á Hjalla við góðum brúktum bilum saman við SLP-Car Rent, sum leigar bilar út. Hetta er nakað, eg havi hugsað um í nøkur ár, tí eingin tílík brúktbilasøla er í Føroyum, sigur stjórin, Ludvík Petersen**

BILFYRITØKA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Eftir at Ludvík Petersen, sum eigur og rekur bilfyritøkuna Bilfríðkan, hevur latið øðrum síni BMW og Fiat umboð, og leigar bygningin í Smiðjugerði til Nordcar, hevur hann keypt eitt øki á Hjalla við tveimum bygningum til brúktbilasølu og bilútleigan.

Grundøkið er 4.200 fermetrar, og í høvuðsbygninginum hevur fyritøkan 1.100 fermetrar at ráða yvir, og inni á økinum er ein annar bygningur upp á 120 fermetrar.

Møguleiki er fyri at leiga ein part av høvuðsbygninginum út.

Ludvík Petersen sigur, at talan er um tvær fyritøkur, Bilfríðkan, sum er ein brúktbilasøla, og SLP-Car Rent, sum leigar bilar út.

Bilfríðkan verður ein bruktbiladepil við stórum úrvali av góðum brúktum bilum og vit leggja okkum eftir at hava nýsýnaðar bilar, sum eru í góðum standi. Vit kunnu bjóða eina sera lagaliga bilfígging av okkara egnu bilum. Í ein vissan mun verður eisini møguligt at selja bilar fyri privatfólk, sigur Ludvík.

Bilarnir, sum SLP-Car Rent leigar út, eru góðir nýggir bilar og inni á heimasíðuni: www.car-rent.fo, eru myndir, prísir og aðrir upplýsingar um hesar bilar.

### Opið hús og listaframsýning

Leygardagin verður opið hús við kaffi og køkum og fleiri góðum brúktbilatilboðum, og listamaðurin Kári Svensson hevur eina listaframsýning í framsýningarhølunum.

Leygardagin 15. mai verður opið frá 10-16 og sunnudagin 16. mai verður opið frá 14-18. Listaframsýningin verður eisini at síggja mánadagin.

Ludvík Petersen sigur, at hann leingi hevur hugsað um at stovna eina slíka fyritøku, og fyri hann er hetta ein spennandi avbjóðing. Navnið Bilfríðkan stendur jú fyri fríðkan av bilum, og tað verður tað, sum vit nú koma at arbeiða við. Brúktu bilarnir verða settir í stand og fríðkaðir, áðrenn teir verða settir inn í framsýningarhølini.

Telefonnummarið hjá Bilfríðkan er nú: 357300.